# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*



26. september fingu Súsanna og Simona ein lítlabeiggja, sum var 57 cm. langur og vigaði 3950 gr.. Foreldurini eru Poula Michelsen Kass og Jákup Sverri Kass, Hoyvík

**Føðingar**

23. september fingu Lív og Richard Johansen, Sandavágur, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 3500 gr.

24. august fingu Birita Jaspursdóttir Joensen og Bárður Helgason Joensen, Århus, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3915 gr.

26. september fingu Anna Olsen og Remy Gaardlykke Hansen, Æðuvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3100 gr.

27. september fingu Ann Tordis K. Hellisdal og Helgi P. Olsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4900 gr.

27. september fingu Sólrun Andreasen og Rúni Kristensen, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4400 gr.

28. september fingu Sølva Petersen, Viðareiði og Heðin Jacobsen, Norðoyri, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3150 gr.

29. september fingu Finn og Sólmei Eydna Nolsøe, Kaldbak, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3250 gr.

30. september fingu Tórhild Hentze og Ólavur Poulsen, Søldarfjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4300 gr.

1. oktober fingu Elin og Jørleiv Syderbø, Húsar, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3610 gr.

1. oktober fingu Beinta Joensen og Mikkjal Miðalberg Johannesen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 3000 gr.

1. oktober fingu Hildur Nielsen og Hans Laksá, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4000 gr.

2. oktober fingu Valborg og Tommy Brockie, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3470 gr.

2. oktober fingu Annika Jørgensen Reinert og Magni Reinert, Hoyvík, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3950 gr.

07.09.08 fingu Marjun Wilhelm og Ólavur Brimnes á Velbastað ein son. Hann vigaði 4650 gr. og var 56 cm. langur

17. september fingu Marit Christiansen og Andras í Frammistovu, Kirkja, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 5000 gr.

25. september fingu Sanna S. Michelsen og Nikael Mortensen, Argir, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3150 gr.

**80 ára føðingardagur**

Sunnudagin 5. oktober 2008 fyllir Michala Jensen Nes - Hvalba 80 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini Meigin frá kl. 16.00.

**70-ára føðingardagur**

Mánadagin 6. oktober verður Jóhannes Jóhannessen, Kolbeinagjógv 70 ár. Dagurin verður hildin hjá Katrinu og Meinhard frá kl. 17.

# Realskúlamynd frá 1954



Her er ein av myndunum frá realskúlaframsýninguni, sum Jórunn Dánialsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í 2007. Myndin er av einum fimleikaliði á ferð við Frú Holm í 1954.

**Aftasta rað f.v.:** Elin Dahl (Johannesen) og Elisabeth Mikkelsen

**Miðraðið f.v.:** Alma Brend, Gunna Midjord, Frú Holm (lærari), Bjørg Matras (Jensen), Petra Weihe (Michelsen).

**Fremst f.v.:** Elly Dam, Sólrun Mohr (Holm), Guðrun Dahl Christiansen (Havsten) og Benadikta Mortensen

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja í sambandi við hesa myndina ella hevur hug at ogna sær hana, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024. (Mynd nr.349)

*Myndaeigari: Marita Guttesen*

†

## Andlát og jarðarferðir

**John (Jonn) Símun Jensen**, ættaður av Sandi, búsitandi í Frederiksberg fer til gravar úr Sands kirkju leygardagin 4. oktober klokkan 14. Sungið verður úr sálmabókini.

**Johannes Bjørgheim Rasmussen, Klaksvík**, vanliga nevndur Johannes í Grótinum andaðist á Klaksvíkar Sjúkrahúsi 30. september, 71 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

Sosialurin -har tað hendir

**Dagurin**

**4. oktober. Franciscus**, deyður í 1226. Sonur ein keypmann í Assisi í Italiu. Hann stovnaði munkaskipan, sum legði størsta dentin á fátækdømi og gjørdist tann best kenda munkaskipanin. Norðurlanda ápostul Ansgar kom frá franciskanarabrøðrunum. Seinni kom ein nunnuskipan afturat. Sankta Frants systrarnar í Tórshavn eru av somu skipan. Frans úr Assisi varð skýrdur halgimenni longu í 1228. Navnið merkir tann franski.

**5. oktober. Placidus**, deyður í umleið 550. Tá ið Bænadikt úr Nurcia bygdi kleystrið Monte Cassino, fekk hann jørð at byggja á frá ríkum rómverja, Tertullus at navni. Placidus var sonur henda rómverja og gekk Bænadikti til handa. Kom sjálvur upp í munkaskipanina og eftir boðum Bænadikts bygdi hann eitt kleystur á Sikiloy. Kleystrið varð rænt og lagt í oyði av sjórænarum og Placidus dripin. Rasmus Rasmussen deyður hendan dagin í 1962.

**6. oktober. Broderus**. Ókent halgimenni.